

# Magn-Effo: 50 milliόna sáttmála við Statoil

**Jan Müller**

27.02.2014 - 20:35

Oljan.fo

Tey bæði føroysku oljufeløgini, Magn og Effo hava gjørt sáttmála við Statoil um at veita boripallinum West Hercules gassolju ta tíðina pallurin borar á føroyska landgrunninum í ár.

Talan er um tilsamans 12 milliónir litrar av serstakari gassolju. Av tí at uppgávan er so mikið stór valdu tey bæði feløgini at bjóða í felag uppá arbeiðið. Tey vóru eisini veitarar í 2012, tá Statoil boraði, men tá var uppgávan munandi minni og gjørdu tey avtalur hvør sær.

Stjórin á Magn, Hendrik Egholm er sera fegin um, at føroysku feløgini hava fingið hesa stóru og spennandi uppgávuna, sum eisini er ein stór avbjóðing fyri tey. Nøgdin av

gassoljuni, sum boripallurin skal brúka komandi umleið hálva árið, svarar til ta nøgd, sum eitt nú flakatrolarin Enniberg brúkar í 3-4 ár.

Magn-stjórin sigur, at trygdarkrøvini eru sera stór, men tað megna føroysku feløgini at liva upp til eins og alla serviseringina í sambandi við avtaluna.

“Vit eru glaðir fyri at kunna vera partur av komandi boringunum á landgrunninum. Hetta gevur okkum áræði til eisini at vera tilreiðar, tá vónandi fleiri brunnar verða boraðir í framtíðini,” sigur Hendrik Egholm, ið ynskir Statoil og hinum oljufeløgunum góða eydnu við spennandi boringunum.

Undan hesum sáttmálanum hevur Statoil eisini gjørt aðrar sáttmálar við føroyskar veitarar, eitt nú oljuútgerðarhavnina í Runavík, Atlantic Airways og Esvagt Thor.

Eftir ætlan kemur West Hercules í føroyskan sjógv í seinnu helvt av apríl